# HAVTASKA

***Lophius piscatorius***

**Serføroyskur fiskastovnur**
**Gagnfiskur**
**Bentopelagiskur fiskur**
**Elsta aldursgreinaða havtaska undir Føroyum: 16 ár**
**Longsta mátaða havtaska undir Føroyum: 136 cm**



## Lívfrøði

Havtaska undir Føroyum verður mett sum ein stovnur. Øll stigini í lívsringrásini hjá havtasku eru funnin í føroyskum sjógvi, frá eggum og yngli til gýtingarbúnan fisk. Eisini eru lokal gýtingarøki funnin. Flytingin (imigratión/emigratión) úr og í føroyska økið er minni enn 5%.

### Útbreiðsla

Havtaska er vanlig í útsynningspartinum í Barentshavinum, fram við norsku strondini til Norðsjógvin og í donskum sjógvi, sjáldan inn í Eystarasalt (Mynd 1). Hon er undir Íslandi og runt Bretsku Oyggjarnar, suður til Gibraltar og nakað suður við Vesturafrika. Eisini í Miðjarðarhavinum og Svartahavinum er havtaska.



*Mynd 1. Útbreiðsla av havtasku.*

Við Føroyar er havtaska vanlig á Landgrunninum og bankunum bæði eystanfyri og vestanfyri. Havtaska er úr vatnskorpuni og fjøruni, niður á 1800 metra dýpi, møguliga enn djypri. Um okkara leiðir er mest til av henni millum 100 og 700 m dýpi. Hon er bæði við botnin og uppi í sjónum, eisini uppi í sjónum á víðum havi.

### Vøkstur

Havtaska veksur skjótari enn djúpvatnsfiskar. Árligi vøksturin hjá havtasku er umleið 8-9 cm um árið til hon er kynsbúgvin (Mynd 2). Aftaná veksur hon seinni.




*Mynd 2. Miðallongd móti aldri, mátað á ymiskum yvirlitstrolingum við Føroyar 2000-2012. Víst er, nær helvtin av havtaskunum er búgvin at gýta fyrstu ferð.*



*Mynd 3. Tvørskurður av "fiskitráðuni" hjá havtasku.*

Ársgomul er havtaskan umleið 20-25 cm til longdar, 5 ára gomul umleið 60 cm og 10 ára gomul havtaska er umleið ein metur til longdar. Kvennfiskurin veksur skjótari og blivur eldri enn kallfiskurin.

Til aldursgreining av flestu fiskasløgum verða nytrurnar nýttar. Hjá havtasku eru nytrurnar sera smáar og torført er at skilja ímillum árringarnar. Tí verður "fiskitráðan" fremst á høvdinum nýtt ístaðin (fremsti fjaðrateinurin). "Fiskitráðan" verður skorin í tunnar flísar. Tá flísarnar verða lagdar undir sjóneyku (Mynd 3), síggjast árringarnir eins og á trøum, men hon er ikki lætt at aldurslesa.




*Mynd 4. Longd móti vekt mátað frá landingum, árini 2010-2016.*



*Mynd 5. Havtaskuyngul, fingin við Magnusi Heinasyni á yngultúri síðst í juni, har trolað varð uppi í sjónum.*

Longd móti vekt fyri allar støddir av landaðari havtasku sæst í Mynd 4. Miðalvektin á 60 cm og 100 cm langari havtasku í kruvdari vekt var ávikavist umleið 2,5 kg og 10,5 kg árini 2010-2016.

## Kynsbúning

Hjá havtasku er kall-fiskurin bæði styttri og yngri enn kvenn-fiskurin, tá hann gýtir fyrstu ferð. Hetta er eisini vanligt hjá øðrum fiskasløgum. Kall-fiskurin er búgvin at gýta tá hann er um 4 ár og 55 cm langur, meðan kvenn-fiskurin ikki er búgvin at gýta fyrr enn hann er um 8 ár og 80 cm. Í miðal gýtir helvtin av havtaskuni fyrstu ferð umleið 6 ára gomul, og tá er hon um 70 cm til longdar (Mynd 2). Ein lítil partur av havtaskuni verður kynsbúgvin longu sum 3 ára gamal, men meginparturin gýtir tó ikki fyrr enn um 5-8 ára aldur.

## Gýting

Gýtingartíðin hjá havtasku í føroyskum sjógvi er frá januar til juli, meginparturin í februar-apríl. Tað eru í minsta lagi tvey gýtingarøkir við Føroyar, eitt á Skeivabanka og eitt við Føroyabanka. Eitt triðja er møguliga millum Sandoyar- og Suðuroyarbanka.

Tað serstaka við havtasku er, at eggini verða gýtt í einum “gelébandi”. Talið á rognkornum í gelébandinum kann vera millum 1 og 3 milliónir, alt eftir støðd á fiskinum.

## Yngul og ungfiskur

Eftir gýtingina flotna rognkornini upp í sjógvin, vard av gelébandinum, og verða flutt við rákinum kring landgrunn og bankar. Havtaskuegg klekjast eftir 6-100 døgum, alt eftir hitanum í sjónum. Klaktu larvurnar eru framvegis vardar av gelébandinum í nakrar dagar, og flytast eins og rognkornini við rákinum. Tá larvurnar eru vorðnar til yngul (Mynd 5), verða tær verandi uppi í sjónum til einaferð seint um summarið ella tíðliga um heystið, tá yngulin, sum nú er um 11 cm til longdar, leitar móti botni; hann líkist nú tí vaksna fiskinum.

Havtaska livir mest á og niðri við botn, har litur og skap hennara gera, at hon fellur sera væl saman við umhvørvinum. Uppvakstrarøki fyri havtasku eru millum annað grunt á Føroyabanka og á Landgrunninum.

## Ferðing

Merking av vaksnari havtasku (> 70 cm) við goymslumerkjum vísa eina týðiliga árstíðarferðing. Havtaska er á grunnum vatni um summarið (grynri enn 200 m), og á djúpum vatni um veturin (djypri enn 300 m). Tað, at fiskurin um summarið í miðal hevur meiri mat í maganum enn um veturin, bendir á, at hon um summarið er í føðiøkinum. Og tað, at høvuðsgýtingartíðin hjá havtasku er frá januar til apríl, bendir á, at hon um veturin er í gýtingarøkinum.

Goymslumerkini vísa eisini at vertikala ferðingin er oftari um veturin enn um summarið, og oftari um náttina enn um dagin. Hetta bendir á, at ljós og dagslongd eru avgerðandi fyri hesa ferðing.

Havtaska er fyri tað mesta at finna í lutfalsliga heitum sjógvi (6,5 til 11 °C), og nærum ikki í sjógvi kaldari enn 4 °C. Goymslumerkini vísa eisini, at havtaska av og á ferðast rættiliga langt upp í sjógvin, frá botni (100-400 m dýpi) heilt upp í vatnskorpuna (grynri enn 50 m dýpi). Henda ferðing upp í sjógvin bendir á, at havtaska gagnnýtir streym, tá hon skal flyta seg úr einum staði í annað.

Merking vísir eisini at tað er minni enn 5% ferðing millum lond, og at vaksni fiskurin sum oftast leitar ”heimaftur” eftir gýting.

## Føði

Føðin hjá havtasku er serliga fiskur (Mynd 6), eitt nú hvítingsbróðir, svartkjaftur, hýsa og toskur. Eisini høgguslokkur og krabbadýr eru funnin í maganum. Pelagisk yngul eta mest fisk (nebbasild) og krabbadýr. Tilsamans eru meir enn 62 ymisk sløg av føði funnin í havtaskamagum. Havtaska etur eisini av sínum egnu (kannibalisma).




*Mynd 6. Føðin í vekt í havtaskumagum býtt í høvuðsbólkar árini 2000-2005. Havast skal í huga, at stovnsstøddirnar av toski og hýsu vóru rættiliga stórar hesi árini.*

## Veiða

Heildarveiðan av havtasku undir Føroyum síðani 1904 er víst á Mynd 7. Fram til umleið 1990 hevur veiðan verið nakað skiftandi við onkrum betri tíðarskeiðum uppímillum, har um 1.000 tons hava verið fiskað. Í tíðarskeiðnum 1995 til 2012 var veiðan størri enn nakrantíð áður, um 2.000-5.000 tons. Í 2012 minkaði veiðan til umleið 500 tons, men er í 2016 og 2017 økt til 900-1.000 tons. Tað eru serliga trolararnir, bæði smáir og stórir, sum fiska havtaskuna. Síðani garnafiskiskapurin eftir havtasku tók seg upp, hava garnaskip eisini fiskað ein part av heildarveiðuni.




*Mynd 7. Heildarveiðan av havtasku undir Føroyum 1904-2017 í rundari vekt.*

Aldursbýtið í havtaskuveiðuni undir Føroyum í 2017 er víst á Mynd 8. Myndin vísir, at meginparturin av havtaskuni var millum 4 og 7 ár, og at bert lítil partur av fiskinum var 2-3 ár ella eldri enn 7 ár. Hvussu nógv 3-6 ára gomul havtaska í miðal hevur vigað í tíðarskeiðnum 1999 til 2017 er víst á Mynd 9.




*Mynd 8. Lutfalsliga aldursbýtið í havtaskuveiðuni undir Føroyum í 2017.*




*Mynd 9. Miðalvektir á 3-6 ára gamlari havtasku 1999-2017.*

Á landingarmiðstøðunum kring landið verður havtaskan bólkað í 5 støddarbólkar, alt eftir kruvdari vekt. Hvussu gomul og hvussu long havtaskan er í mun til vektbólkarnar 1 til 5 fyri árini 2000 til 2016 er víst í Talvu 1. Mest hevur verið landað frá støddarbólkunum 3 og 4.

*Talva 1. Umrokningartalva út frá støddarbólkum. Virðini byggja á tøl fyri árini 2000-2016. Aftasta kolonnan sigur, hvussu stórur partur av fiskinum í ymsu støddarbólkunum væntandi hevur gýtt minst einaferð.*

| | Kruvd vekt (kg) | Aldur (ár) | Longd (cm) | Búgvin |
|---|---|---|---|---|
| Stødd 1 | 10,0+ | 9-14+ | 96-114+ | 100% |
| Stødd 2 | 5,0-10,0 | 7-11 | 78-94 | 43-100% |
| Stødd 3 | 3,0-5,0 | 5-8 | 65-77 | 24-87% |
| Stødd 4 | 1,0-3,0 | 3-6 | 47-64 | 0-77% |
| Stødd 5 | <1,0 | 2-4 | 34-44 | 0-43% |

## Stovnsmeting

Ongin stovnsmeting verður gjørd fyri havtasku við Føroyar. Hinvegin kunnu tøl frá "veiðu upp á roynd" (cpue) nýtast til at geva eina ábending um, hvussu støðan er hjá stovninum.

Fyri havtasku hava vit cpue-tøl frá føroyskum trolarum, sum fáa hana sum hjáveiðu (Mynd 10). Trolserian vísir, at veiða upp á roynd fyri havtasku var høg árini 2003 til 2006, 24 kg/tíma, tá hon var størst. Síðani er hon minkað og hevur ligið um 9-13 kg/tíma, sum er umleið tað sama, sum árini fyri 2003.

Tá Magnus Heinason ger yvirlitstrolingar á Landgrunninum, fær hann eisini havtasku sum hjáveiðu. Cpue-serian um summarið vísir vøkstur í sama tíðarskeiði, frá umleið 2000-2006, men er síðani minkað aftur (Mynd 11), og er nú umleið tað sama sum áðrenn tað góða tíðarskeiðið. Yvirlitstrolingarnar um várið hjá Magnusi Heinasyni eru ikki so umboðandi, av tí at havtaskan ferðast nógv hesa tíðina á árinum.

Havtaska við Føroyar verður ikki viðgjørd í ICES.




*Mynd 10. Veiða upp á roynd av havtasku hjá føroyskum trolarum (1997-2016).*




*Mynd 11. Veiða upp á roynd av havtasku hjá Magnusi Heinasyni á yvirlitstrolingunum á Landgrunninum um várið (1994-2018) og um summarið (1996-2017).*

### Keldur

Ofstad, L. H. 2013. Anglerfish *Lophius piscatorius* L. in Faroese waters. Phd-ritgerð um havtasku við Føroyar.

Mouritsen, R. 2007. Fiskur undir Føroyum.

Jákupsstovu, S. H. í, 2004. Fiskiskapur við Føroyar í 100 ár. Úrdráttir úr hagtølum frá ICES.

Ábyrgdarfrøðingur: Lise H. Ofstad